HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

# Stjóri til Heilsutrygd

*Hava leiðsla og fyrisiting tín áhuga, og leitar tú eftir spennandi avbjóðingum, so er starvið sum stjóri fyri Heilsutrygd ein áhugaverdur møguleiki.*

**Um starvið.**
Stjórin fyri Heilsutrygd fær ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini og rakstrinum av stovninum.

Stjórin fyri Heilsutrygd hevur evstu ábyrgdina mótvegis Heilsu- og innlendismálaráðnum í fyrisitingar-, fíggjar- og starvsfólkamálum.

Ein týðandi uppgáva verður framhaldandi at menna eina talgilda og nýmótans umsiting innan økið, og at vera við í arbeiðinum at verkseta ætlanirnar og nýskipanir á økinum í samráð við stjórnarráðið.

Í høvuðsheitum røkir Heilsutrygd hesar uppgávur:

- Umsitur lógina um almenna heilsutrygd, sum fevnir um veitingar, tilskot, tænastur og ískoyti til størsta partin av primeru heilsutænastuni í Føroyum. Samanumtikið umsitur Heilsutrygd umleið 185 mió. krónur um árið.
- Umsitur og hevur eftirlit við galdandi sáttmálum. Her undir framleiðir hagtøl og annað tilfar, sum kann styrkja eftirlitið.
- Umsitur og mennir heilivágstilskotsskipanina í tøttum samstarvi við Apoteksverkið.
- Umsitur ískoyti til ávís hjálparráð.
- Avgreiðir beinleiðis veitingar til borgarar, eitt nú endurgjald til ferðing til og frá lækna, gravarhjálp, einstaklingatilskot og ískoyti til brillur.
- Luttekur í sáttmálasamráðingum við fakfeløg um veitingar sambært lógini.
- Umsitur kommunulæknaskipanina.

**Førleikar:**
Sett verður sum krav, at umsøkjarin hevur útbúgving frá hægri lærustovni og leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum ella útbúgving og royndir, ið kunnu javnsetast við hesi.

Umráðandi er, at tann, ið verður settur, hevur evni at seta í verk fyriskipanir og hevur nútíðar leiðslueginleikar, innlit og vitan um tær treytir, ið eru galdandi í eini almennari fyrisiting. Tað er tí ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur leiðsluroyndir frá almennari fyrisiting.

Góð greiningarevni við tølum og innan fíggjarliga økið hava týdning umframt at hava góða fatan av, hvussu umsitingarligar mannagongdir kunnu talgildast.

Av tí at starvið ber í sær víttfevnt samstarv, verður dentur lagdur á at finna ein persón við góðum samstarvsevnum, sum er álitisvekjandi og vísur myndugleika.

**Løn- og setartreytir**
Setanarøkið er Heilsu- og innlendismálaráðið og stovnar undir tí við tænastu á Heilsutrygd. Viðkomandi, ið settur verður, skal kunna tola broytingar í starvinum, bæði í starvsinnihaldi og vavi. Næst fyrisetti er aðalstjórin í Heilsu- og innlendismálaráðnum.

Starvið verður lønt í 37. lønarflokki hjá tænastumonnum landsins, tó uttan at vera tænastumannastarv. Eftirlønargjaldið er 15%, og skal flytast í eina av Fíggjarmálaráðnum góðkenda eftirlønarskipan.

**Nærri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Turid Arge, aðalstjóra umvegis turid.arge@himr.fo ella á tlf. +298 304050.

**Umsókn**
Umsókn saman við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til:

Heilsu- og innlendismálaráðið
Eiraragarður 2
100 Tórshavn
ella himr@himr.fo

Umsóknarfreistin er 17. februar 2016, kl 12:00.